Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

31. oktobur 2023

Hoyringssvar til uppskot um "Løgtingslóg um málskúla fyri føroyskt sum annaðmál"

Tað er neyðugt og av stórum týdningi, at "Føroyskt sum annaðmál" verður raðfest, og at tryggir karmar eru um hetta virksemið, og er tað gleðiligt at Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið hetta upp.

Undirvísingarstýrið hevur viðgjørt uppskotið og hevur hesar viðmerkingar:

Undirvísingarstýrið hevur ikki verið við í tilgongdini at orða fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg.

Vit vilja í stóran mun ikki viðmerkja einstakar ásetingar í uppskotinum, tó onkrar. Heldur vilja vit viðmerkja yvirskipaðu skipanina av málskúla. Vit halda, at her eru so nógv viðurskifti, ið krevja grundleggjandi nýggja viðgerð.

Vit halda ikki, at nóg mikið er gjørt fyri at fáa økið *Føroyskt sum annaðmál* í tær skúlaskipanir, vit longu hava, og sum eru: fólkaskúli, miðnámsskúlar, frítíðarundirvísing (kvøldskúlar) og enntá háskúlar. Vit halda ikki, at tað er neyðugt at skipa ein nýggjan stovn til at taka sær av eini undirvísingaruppgávu, ið longu passar inn undir fleiri verandi skipanir. Umframt skúlaskipanir, hava vit í dag stovnar, ið taka sær av líknandi undirvísingaruppgávum, so sum kvøldskúlar, Prógvstovuna, Nám og Undirvísingarstýrið.

Vit hava eina nýggja kunngerð frá 2020 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing (kunngerð nr. 144 frá 6. oktobur 2020 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing), sum hevur heimild í § 5, stk. 6 í fólkaskúlalógini, ið partvíst júst er fyri sama málbólk, ið hetta lógaruppskotið eisini fevnir um, har tað í § 1 í lógaruppskotinum verður sagt *"verður landsumfatandi undirvísing í føroyskum sum annaðmál, skipað fyri tilflytarum eldri enn 12 ár"*. Undirvísingarskyldan sambært fólkaskúlalógini endar, tá ið barnið hevur fingið regluliga undirvísing í 9 ár, tó í seinasta lagi 31. juli í tí álmannakkaári, barnið fyllir 17 ár, sbrt. § 42, stk. 1 í fólkaskúlalógini.

Vit halda ikki, tað er rætt, at hava tvær skipanir, ið venda sær til sama málbólk. Í viðmerkingunum verður sagt, at *"málskúlin kann eisini átaka sær uppgávuna at skipa fyri móttøkuflokki fyri eldru næmingarnar í fólkaskúlanum"*. Fólkaskúlin hevur útbúgvið fólk til hesa uppgávu. Ein rímiliga stór íløga er gjørd í eftirútbúgving av lærarum til júst hetta.Vit duga ikki at síggja fyrimunin í, at ein annar stovnur skal inn í fólkaskúlan, at røkja hesa uppgávu í staðin fyri fólkaskúlan. Vit meta, at tað heldur átti at verðið sett meira inn í verandi skipanum, t.d. við at útbúgva starvsfólkini í størri mun, enn man hevur gjørt higartil. Eisini fremur tað integratiónina, um tilflytarar t.d. koma inn í føroyska fólkaskúlan, heldur enn at fara í ein málskúla á aðrari staðseting, har tey einans eru saman við øðrum tilflytarum, heldur enn føroyskum næmingum.

Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Undirvísingarstýrið hevur í fleiri ár eftirlýst eina dagføring av frítíðarundirvísingarlógini ella eina heilt nýggja lóggávu á hesum økinum. Vit halda, at væl hevði borið til at dagføra lógini um frítíðarundirvísing, m.a. við tí endamáli at skapa betri rúmd fyri undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksnum tilflytarum; møguliga í samstarvið við fólkaskúlan í økinum. Harumframt átti at verið umhugsað, um ikki háskúlarnir eisini áttu at fingið møguleika at bjóða slík stutt og intensiv málskeið út til vaksin. Um hetta ikki rúmast í verandi háskúlalóg, so hevði verið hóskandi at sett gongd á tað arbeiðið, ið Undirvísingarstýrið hevur eftirlýst í fleiri ár, nevniliga at fáa eina nýggja háskúlalóg.

Harafturat hava vit miðnámsskúlaskipanina, ið hevur drúgvar royndir at skipa undirvísing fyri vaksnum, og sum hevur skipanir við lestrarvegleiðing og øðrum stuðulsskipanum, ið málbólkurin, sum hetta lógaruppskotið vendir sær til, átti at kunna gagnnýtt.

Lógaruppskotið hevur fleiri ásetingar um fyriskipan, hvussu starvið sum málskúlastjóri skal skipast, og hvørjar uppgávurnar eru. Vit halda ikki tað er rætt at áseta við lóg, hvussu ein møguligur málskúli skal skipast, og hvat innihald eitt starv skal hava. Hetta er óneyðugt, stirvið og ikki hóskandi ásetingar at hava í eini lóg.

Økið "Føroyskt sum annaðmál" er frá august 2023 flutt frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til Undirvísingarstýrið og Nám at fyrisita, og kann fyrisitast við støði í tí fyrisiting Undirvísingarstýrið annars hevur av undirvísingarverkinum. Eftir okkara fatan er ikki neyðugt at skipa ein nýggjan lógarásettan stovn, við lógarásettum fyrisitingarligum skipanum. Um ætlanin hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum framhaldandi er, at Undirvísingarstýrið skal fyrisita hetta økið, so kunnu vit væl gera tað við teimum organisatorisku skipanum vit hava og fyrisitingarligu uppgávum, við skipan av størvum og ábyrgdarøkjum. Um Barna- og útbúgvingarmálaráðið vil fasthalda, at talan skal vera um ein stovn fyri seg, so er okkara tilmæli, at hesin verður lagdur uttanfyri Undirvísingarstýrið.

Um lestrarstuðul skal gjaldast til tey, ið taka "føroyskt sum annaðmál" fulla tíð er neyðugt, at lógin um lestrarstuðul verður broytt.

Um lógaruppskotið verður framt, sum fyriliggjandi, so kemur kostnaður neyvan at halda. Ein stjóri kostar meira enn 600.000 um árið, og hædd er ikki tikin fyri fyrisitingarligum útreiðslum so sum heimasíðu, keyp av teldum og telefonum til stavsfólk, kt-loysnum, skjalhald, telefonhald, húsaleigu, ferðaútreiðslum o.s.fr.

Samanumtikið halda vit, at hetta lógaruppskotið er ikki búgvið til at fara til politiska viðgerð og heita á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um, at viðgera málið av nýggjum, har m.a. Undirvísingarstýrið, ið hevur dagligu fyrisitingina av undirvísingarverkinum, er við í viðgerðini.

Vinarliga

Hjalmar Hansen
stjóri